# Viðgerð av persónupplýsingum, tá ið tú søkir starv hjá BankNordik

Í sambandi við at tú sendir eina starvsumsókn og tilhoyrandi fylgiskjøl til BankNordik, er tað týdningarmikið, at tú gert teg kunnuga/n við, hvussu BankNordik viðger tínar persónsupplýsingar. Hetta er galdandi, bæði tá ið tú søkir av tínum eintingum og við støði í einari starvslýsing.

**Viðgerð av persónupplýsingum**
Tær persónsupplýsingar, sum tú letur okkum í sambandi við eina starvsumsókn ella í einari setanartilgongd, verða einans brúktar og goymdar í sambandi við setanartilgongdina og í sambandi við møguliga starvssetan.

Persónsupplýsingar, sum verða savnaðar í einari setanartilgongd, verða viðgjørdar í trúnaði og við neyðugu trygdini. Upplýsingarnar verða einans gjørdar tøkar fyri starvsfólkum, sum hava tørv á tí í sambandi við setanartilgongdina, t.d. fyri tínum møguliga komandi leiðara umframt viðkomandi starvsfólkum á Starvsfólkadeild bankans.

**Samband**
Um tú søkir starv við støði í einari serstakari starvslýsing, kanst tú seta teg í samband við tann persónin, sum er nevndur í lýsingini fyri at fáa fleiri upplýsingar um starvið og um viðgerð av persónupplýsingum í BankNordik. Tá ið tú søkir av tínum eintingum, kanst tú senda Starvsfólkadeildini eina umsókn og lívsrensl (CV) við telduposti á hr@banknordik.fo, ella við vanligum posti til Starvsfólkadeildina, Oknarvegur 5, 100 Tórshavn.

**Víðarilating av persónupplýsingum til triðjapart**
Vit brúka í ávísum førum uttanhýsis veitarar í ES í sambandi við starvssetanir – undir hesum ráðgevingarfyritøkur, veitarar av persónleikaroyndum o.s.fr. Víðarilating til møguligar triðjapartar verður framd í samsvari við skrivligar dátuviðgeraravtalur. BankNordik hevur eftirlit við, um dátuviðgerar hava sett í verk hóskandi trygdarfyriskipanir.

**Viðmæli**
At finna best egnaða umsøkjaran til eitt starv í BankNordik er eitt sjálvsagt heimilað áhugamál hjá BankNordik. Í hesum sambandi kunnu vit biðja um viðmæli frá fyrrverandi arbeiðsgevarum, útbúgvingarstovnum ella øðrum viðkomandi pørtum. Vit biðja ikki um viðmæli frá núverandi ella fyrrverandi arbeiðsgevara uttan títt samtykki. Um tú hevur víst á ein ella fleiri persónar í tíni umsókn ella tínum lívsrensli í sambandi við veiting av viðmæli, kunnu vit í setanartilgongdini seta okkum í samband við hesar.

**Viðkvæmar persónupplýsingar**
BankNordik viðger ikki viðkvæmar persónsupplýsingar um teg uttan títt samtykki. Starvssetan hjá BankNordik er treytað av, at tú kanst sýna fram reina revsiváttan. Um vit vilja bjóða tær starv, biðja vit teg tí um at útvega okkum revsiváttan.

Í setanartilgongdini fyri summi størv nýta vit persónleikaroyndir. Hetta er treytað av tínum samtykki. Samtykkið skal latast, tá ið tú fert undir royndina. Um tú ikki letur samtykki, skalt tú vera varug/ur við, at tað kann hava við sær, at tín umsókn verður noktað. Royndin verður vanliga gjørd í sambandi við setanarsamrøðuna og hevur til endamáls at lýsa tínar persónligu eginleikar, so vit hava eitt útgangsstøði til samrøðu um tínar persónligu styrkir og veikleikar. Royndin verður veitt av einum uttanhýsis

samstarvsfelaga, sum vegna BankNordik viðger upplýsingar um teg. Royndin stendur ikki einsamøll, men er partur av samlaða metingargrundarlagnum, tá ið vit velja rætta umsøkjaran til starvið. Starvsfólkadeildin og viðkomandi deildarleiðari velja vanliga í felag rætta umsøkjaran.

Í sambandi við starvssetan til ávís álitisstørv – t.d. sum roknskaparleiðari – kann tað vera viðkomandi at útvega upplýsingar frá triðjaparti um tíni fíggjarviðurskifti (t.d. frá kredittupplýsingarfeløgum). Um hetta er viðkomandi fyri starvið, sum tú søkir, biðja vit um títt samtykki, áðrenn vit útvega tílíkar upplýsingar.

**Goymsla av persónupplýsingum**
BankNordik goymir upplýsingar um umsøkjarar hjá uttanhýsis samstarvsfeløgum í ES. Samstarvið við veitararnar er fevnt av skrivligum dátuviðgeraravtalum, sum eru í samsvari við dátuverndarlógina. BankNordik hevur eftirlit við, um dátuviðgerar hava sett í verk hóskandi trygdarfyriskipanir.

**Tíðarskeið fyri goymslu av persónupplýsingum.**
BankNordik varðveitir tína umsókn, fylgiskjøl o.s.fr., inntil umsóknin er viðgjørd. Tá ið talan er um umsókn til eina serstaka starvslýsing, verða skjølini varðveitt, inntil setanartilgongdin er endað, tó í mesta lagi í 6 mánaðir. Um tú fært starv í BankNordik, verða tær upplýsingar, sum vit hava savnað inn í sambandi við setanartilgongdina, goymdar í samsvari við okkara innanhýsis reglur fyri viðgerð av persónupplýsingum um starvsfólk, sum vit handa tær í sambandi við starvssetan.

## Tíni rættindi

Sambært dátuverndarlógini hevur tú rættindi í samband við okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum.

- **Rætturin til innlit**: Tú hevur rætt til at fáa innlit í tær upplýsingar, sum vit viðgera um teg.
- **Rætturin til rætting**: Tú hevur rætt til at fáa rangar upplýsingar um teg sjálvan rættaðar.
- **Rætturin til striking**: Í summum førum hevur tú rætt til at fáa upplýsingar um teg sjálvan strikaðar, áðrenn okkara ætlaðu striking.
- **Rætturin til viðgerðaravmarking**: Í summum førum hevur tú rætt til at fáa viðgerðina av tínum persónupplýsingum avmarkaða. Um tú hevur rætt til at fáa viðgerðina avmarkaða, kunnu vit framyvir í útgangsstøðinum bert goyma persónupplýsingarnar.
- **Rætturin til dátuflutning**: Tú hevur í summum førum rætt til at fáa tínar persónupplýsingar útflýggjaðar í einum skipaðum, vanliga nýttum og teldutøkum sniði og at fáa hesar persónupplýsingar fluttar frá einum dátuábyrgdara til ein annan uttan forðing.
- **Rætturin til mótmæli**: Tú hevur í summum førum rætt til at mótmæla okkara viðgerð av tínum persónupplýsingum.
- **Rætturin til ikki at vera fyri individuellari avgerð**, sum einans er grundað á automatiska viðgerð

Umbønin verður svarað skjótast gjørligt og í seinasta lagi 4 vikur eftir, at hon er móttikin. Um serstøk viðurskifti so sum nøgd og torgreidni gera, at tað er ógjørligt at svara umbønini innan 4 vikur, kann tíðarskeiðið leingjast við 8 vikum. Tú fært serstøk boð frá okkum, um freistin verður longd, og tá umbønin er svarað.

**Samband og kæra**

Tú ert vælkomin at seta teg í samband við okkum, um tú hevur spurningar um tíni rættindi, ella um hvussu vit viðgera tínar persónupplýsingar. Tú kanst seta teg í samband við okkara dátuverndarfólk:

*Teldupostur*: dpo@banknordik.fo
Oknarvegur 5, Postboks 3048
FO-110 Tórshavn
Tlf.: +298 330 330

Um tú ert ónøgd/ur við, hvussu vit viðgera tínar persónupplýsingar, og um tú metir, at úrslitið av tíni áheitan til okkara dátuverndarfólk ikki var nøktandi, kanst tú seta teg í samband við okkara kæruviðgera:

*Teldupostur*: jura@banknordik.fo
Att. Legal
Oknarvegur 5, Postboks 3048
FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 330 330

Tú kanst eisini lata Dátueftirlitinum klagu:

Dátueftirlitið
*Teldupostur*: dat@dat.fo
Tinganes, Postboks 300
FO-110 Tórshavn
Tlf.: +298 309 101